# Kyndil iðrar seg

**HONDBÓLTUR** Kyndil tók ikki av gylta møguleikanum at vinna seg nærri finaluplássinum í gjár. Havnarmenninir vóru greitt á odda, men kollfirðingar fingu fótafestið aftur. Niklas Reginsson var stórspælandi og skeyt 15 mál

Uni Holm Johannesen

Tað rakk bara til annað stigið hjá Kyndli.

Hóast havnarmenninir vóru greitt á sigurskós í seinna hálvleiki, misti Kyndil fótafestið seinastu minuttirnar. Støðan var 11-15 í hálvleikinum, og eitt skifti vóru teir grønu á odda 20-14 í seinna hálvleiki. Tað merktist serliga í verjuspælinum, at Hans Áki Dal-Christiansen, Kyndil, varð útvístur miðskeiðis í seinna hálvleiki.

Kollfirðingar hava seinastu vikuna syrgt fyri, at hvørki VÍF ella Kyndil hava vunnið seg nærri finaluplássinum. Seinasta vikuskiftið stevndu vestmenningar leingi móti sigrinum, men KÍF snaraði øllum á høvdið seinastu løtuna. Sama gongdin var í gjár. Tað vísir væl og virðiligа, at kollfirðingar eru betur fyri kropsliga og kunnu spæla við fullari megi í ein samfullan tíma, samanborið við hini liðini.


Mynd: Álvur Haraldsen

Dysturin endaði 27-27 í gjár. Niklas Reginsson, sum skeyt 15 mál í alt, javnaði fyri KÍF í seinasta álopinum.

## KÍF – Kyndil 27-27 (11-15)

Áskoðarar: 150 fólk
Dómarar: Ragnar Simonsen og Rúni Mohr

**10 min.: 3-7**
**20 min.: 7-11**
**40 min.: 17-21**
**50 min.: 22-24**

**KÍF:** Niklas Reginsson 15, Andrias Nielsen 6, Regin Petersen 2, Tony Weihe 1, Ási Dam 1, Agnar Joensen 1, Teitur Joensen 1.
**Kyndil:** Karl Jóhan Djurhuus 8, Andrias Sólsker 6, Bárður Johannesen 4, Hans Áki Dal-Christiansen 4, Rúni Johansen 3, Rani Ellingsgaard 2.
Útvísingar: KÍF 3, Kyndil 5.

## Neistin – StÍF 43-32 (21-10)

Áskoðarar: 100 fólk
Dómarar: Heri Petersen og Dánjal Samuelsen

**10 min.: 5-3**
**20 min.: 11-7**
**40 min.: 26-17**
**50 min.: 33-24**

**Neistin:** David Edvardsen 16, Sjúrður Thomassen 7, Jugoslav Djumic 6, Áki Mørk 5, Ingi Olsen 4, Rósing Rasmussen 4
**StÍF:** Sveinur Justinussen 7, Marius Joensen 7, Leivur Justinussen 4, Jón Rasmussen 3, Jørmund Joensen 3, Alexandur Johansen 3, Bent Djurhuus 2, Fríði Djurhuus 1, Jóannes Prestá 1.
Útvísingar: Neistin 1, StÍF 0.

## Atlantic Airways Deildin *Menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 17 | 602 | 460 | 142 | 33 |
| 2 | KÍF | 16 | 456 | 413 | 43 | 22 |
| 3 | Kyndil | 17 | 440 | 438 | 2 | 18 |
| 4 | VÍF | 16 | 444 | 409 | 35 | 16 |
| 5 | H71 | 15 | 399 | 402 | -3 | 14 |
| 6 | StÍF | 16 | 403 | 428 | -25 | 9 |
| 7 | Team Klaksvík | 15 | 348 | 542 | -194 | 0 |

# Edvardsen í hopla

**HONDBÓLTUR** David Edvardsen hevði høvuðsleiklutin í gjár. Hann skeyt 16 mál móti sínum fyrrverandi liðfeløgunum, tá Neistin rann StÍF um koll og tryggjaði sær pláss í FM-finaluni

Uni Holm Johannesen

David Edvardsen smæðist ikki millum stórspælararnar hjá StÍF. Hann spældi framúr væl í fjør, tá Neistin vann greipuna. Tað hevur ikki eydnast eins væl í hesum kappingarárinum, men hann er framvegis ein av fleiri stórspælanum, sum Ingi Olsen, venjari, ræður yvir.

Edvardsen skeyt heili 16 mál, tá Neistin vann stórsigur, 43-32, á StÍF í gjár.

### Spældi við StÍF

Edvardsen spælir sítt fjórða kappingarár í Føroyum. Eina viku undan kappingarbyrjan í 2007 ringdi Claus Rasmussen, táverandi venjari hjá StÍF, til hansara og rópti neyðarróp. Hann hevði tørv á spælarum við máltevi. Framman undan varð Danni Syhler knýttur at hópinum hjá strandingum, og hann hevði ávirkan á avgerðina hjá Edvardsen, sum tók av tilboðnum.

Edvardsen og Syhler gingu undan hjá StÍF, sum vann seg í finaluna í steypakappingini og landskappingini. Strandingar tapti í báðum førum.

Árið eftir skifti hann til føroyameistararnar úr Neistanum. Hann stóð í skugganum á Áka Mørk, Tróndi Kragesteen, Jugoslav Djumic, Finni Hansson og hinum. Hann fekk ongantíð fótin fyri seg hjá teimum bláu, sum vann steypakappingina.

Seinastu tvey kappingarárini hevur hann myndað álopsspælið hjá Neistanum. Tað prógvaði hann aftur í gjár.

Hann og Neistin settu ferðina upp beinanvegin og stevndu móti sigrinum frá byrjan. StÍF royndi at renna aftaná, men spurningurin var hinvegin, hvussu stórur sigurin skuldi vera.

uni@sosialurin.fo



*David Edvardsen skeyt ikki færri enn 16 mál móti strandingum*
Mynd: Álvur Haraldsen

# Framburður í Klaksvík

**HONDBÓLTUR** Team Klaksvík hevur lítið at fegnast um. Liðið tapir hvørt vikuskiftið. Hóast tað er framburður í spælinum, og tað kennist sum ein sigur fyri klaksvíkingar


Mynd: Álvur Haraldsen

Uni Holm Johannesen

Teir vóru greiðir yvir tað beinanvegin. Team Klaksvík fór ikki at standa hinum kurl í bestu deildini.

Pole J. Hansen, sum stóð á odda fyri liðnum fyrstu dystirnar, var nakað bjartskygdur, tá Sosialurin prátaði við hann undan kappingarbyrjan. Klaksvíkingar fóru at enda nummar fimm, væntaði hann.

Fríðin Ziskason, formaður, tók ikki munnin ov fullan. Málið var fremst av øllum at menna spælararnar.

Úrtøkan hevur verið soltin. Einki stig í 15 dystum. Men hinvegin kunnu klaksvíkingar fegnast um, at tapini eru ikki eins stór sum fyrr í hesum kappingarárinum.

Fríðin Ziskason er avgjørdur í viðtalu við heimasíðuna hjá Neistanum.

– Sjálvandi er tað torført at halda høvdið høgt, tá liðið bara tapir dystirnar. Vit vistu frá byrjan, at Team Klaksvík fór at hava torført við at fóta sær í bestu deildini. Tað var rætt at flyta upp í bestu deildina, men skulu vit varðveita spælararnar næsta kappingarár, mugu vit seta okkum onnur mál, sigur Fríðin Ziskason við neistin.fo.

### Níggju mál hesaferð

Fríggjakvøldið tapti Team Klaksvík fyri hoyvíkingum í Klaksvík. Úrslitið var 39-30.

Tað var ein avgreiðsluspurningur, tí H71 stevndu móti sigrinum beinanvegin. Hinvegin kundu klaksvíkingar fegnast um løtur av dystinum. Finn á Svøð, aldursforsetin millum stengurnar, hevði fleiri bjargingar, men hann er ikki ein varandi loysn. Hanus Norðberg, sum er fluttur úr H71 til Team Klaksvík, hevur styrkt munandi um skotstyrkina í álopsspælinum. Zarko Pejovich hevur eisini staðið seg væl í hesum kappingarárinum.

Framburðurin er ikki sjónligur í Klaksvík, men klaksvíkingar taka smá fet rætta vegin. Tað hevur kappingin prógvað í ár, hóast hini liðini geva oftast yngru leikarunum møguleikan, tá Team Klaksvík er mótstøðuliðið.

uni@sosialurin.fo